52-014/2025

FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

22. september 2025
Mál: 25/24217-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-014/2025

**Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-014/2025 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Jóhan Christiansen, um bygdaleiðir og túrar gjøgnum Eysturoyartunnilin**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær kunnu fólk í Norðoyggjum og Eysturoy vænta, at fleiri túrar til Havnar verða koyrdir gjøgnum Eysturoyartunnilin ?
2. Er nøkur loysn funnin á kostnaðinum fyri bussar hjá SSL at koyra gjøgnum Eysturoyartunnilin? Um nei, nær kann væntast ein loysn?
3. Hvussu langt er arbeiðið komið við at verkseta nýggju planleggingarskipanina?

**Svar til spurning 1, 2 og 3.**

Strandferðslan metir, at broytingarnar á leið 401 millum Klaksvík og Tórshavn verða klárar at seta í verk í seinasta lagi 1. desember 2025. Somuleiðis verður arbeitt við at gera tillagingar á øðrum leiðum, ið eru knýttar til millum annað leið 400 og 401, soleiðis at tænastan á hesum leiðum eisini gerst betri.

Verandi prísir í Eysturoyar- og Sandoyartunlunum eru tó framvegis ein fíggjarlig avbjóðing fyri at gagnnýta tunlarnar til størri títtleika á eitt nú leið 401. Tí verður møguliga neyðugt at finna sparingar á øðrum leiðum fyri at fíggja eitt økt túratal gjøgnum eitt nú Eysturoyartunnilin.

Nýggja planleggingarskipanin er nú komin so mikið áleiðis, at skipanin er at kalla klár at seta í verk, og til at nýta í dagligu umsitingini av bygdaleiðum. Planleggingarskipanin verður eitt týðandi amboð til at leggja til rættis dagføringar á verandi leiðum og í sambandi við komandi útbjóðing av bygdaleiðum.

**Jóhan Christiansen**
landsstýrismaður

Ministry of Fisheries and Infrastructure

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo